## Burturflutt barn funnið

Pinkubarnið, sum foreldrini burturfluttu av sjúkrahúsinum í Esbjerg tann 3. juni, er funnið í øllum góðum í Kekkia. Tað kunngjørdi løgreglan í Esbjerg í morgun. Sagt varð, at kekkika løgreglan hevur boðað donsku løgregluni frá, at hon hevur foreldrini og barnið í varðveitslu, og at teir donsku myndugleikarnir fara nú at biðja um at fáa tey til Danmarkar. Tann burturflutti smádrongurin er nú 23 dagar gamal. Foreldrini, sum eru rúsevnamisnýtarar, gjørdu av at burturflyta barnið, tá tey fingu at vita, at tað skuldi takast frá teimum, tí tey eru misnýtarar.



## Ryanair spennir seg út

Meðan tey flestu flogfeløgini kæra seg um færri ferðafólk og veksandi hall, økir tað írska lágprísfelagið Ryanair sítt virksemi. Felagið hevur júst kunngjørt, at tað fer undir ellivu nýggjar rutur úr Noregi og út í heim. Eftir ætlanini fer felagið at flúgva úr Torp til Paris, Rom og polsku býirnar Krakow og Lodz, og harumframt verða nýggjar rutur úr Rygge til Alicante, Genoa og Madrid í Spania, London Stansted í Bretlandi, til Bremen í Týsklandi og til italska býin Bergamo. Tað er tó ikki bara Ryanir, sum hevur lætt flog í hesum tíðum. Tað sama er galdandi fyri tað norska lágprísflogfelagið Norwegian.

# Uttanríkisráðið í FISK

**FISK09 – altjóða filmssummarskúlin fyri ung millum 18 og 25 ár – byrjaði 6. juli og heldur fram vikuna út**

FILMSSKÚLI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í sambandi við FISK09 hava filmsáhugað ung fólk úr Noregi, Svøríki, Finlandi, Skotlandi og Føroyum farnu vikuna verið við filmsútgerð kring landið og gjørt film. Endamálið er at læra tey, hvussu filmsarbeiði fer fram á hægsta støði.

Seinasta hálva árið hava tey miðvíst fyrireikað seg til túrin í Føroyum, millum annað við at møtast á alnótini og framleiða tilfar at brúka í samband við filmsskúlan í Føroyum. Lidnu filmarnir verða sýndir í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 17. juli klokkan 17.

Næmingarnir verða undirvístir og vegleiddir av toppprofessionellum filmsfólkum við drúgvum royndum innan filmsgerð kring heimin. Tey koma úr Svøríki, Danmark, USA og Føroyum.

Uttanríkisráðið hevur fyrireikað filmssummarskúlan í samstarvi við Klippfisk og við dyggum stuðuli frá Kringvarpið Føroya, Mentamálaráðnum og Norðurlandahúsinum, umframt privatu stuðlunum Hotel Føroyar, Atlantic Airways og Vodafone.

FISK09 er harumframt stuðlað av Nordisk Kulturfond og Vinnuframagrunninum og er ein liður í NPP-verkætlanini NoCry. Les meira um NPP á www.northernperiphery.eu

Føroyski parturin av NoCry verkætlanini er eitt natúrligt framhald av arbeiðinum í samband við filmsálitið, sum Mikkjal Helmsdal gjørdi fyri Sam-Vit í 2007 um føroyska filmsvinnu og møguleikar fyri at betra filmsvinnu umstøðurnar í Føroyum.

### Stóran týdning

Hetta er aðru ferð, at hesin filmsskúlin verður hildin í Føroyuum.

- Fyrru ferð var í 2006, og tá var meiningin, at skúlin skuldi gerast fastur táttur á hvørjum ári. Men av ymsum orsøkum gjørdist hetta av ongum, sigur Martin Simonsen, verkleiðari.

Hann vónar, at tað fer at bera til at fremja somu verkætlanina komandi ár.

- Tað er Nordisk Kulturfond, sum í stóran mun stuðlar verkætlanini og tað tykist, sum teir meta hana sum eitt gott hugskot, sigur Martin Simonsen.

Hann sigur, at Føroyar tykjast hava eina dragandi megi mótvegis bæði næmingum og lærarum, og fleiri teirra ganga aftur frá tiltakinum í 2006.

- Fólk gerast bergtikin av øllum umhvørvinum, og slíkt dregur til sín kreativar kreftir. Føroyar eru ein ótømandi kelda til íblástur, sigur Martin Simonsen.

Upptøkufólk ynskja vakrar og góðar myndir, at tær kunnu tey fáa í Føroyum. Tí ræður um at fólk gerast varug við møguleikarnar her.

- Hugsa tær til, um ein James Bond-filmur hevði verið upptikin her. Alt offspin'ið ið hevði staðist av, at eini 200-300 fólk eru her í einar fýra mánaðir, sigur Martin Simonsen.

Hinvegin er greitt, at slíkt dettur ikki bara niður í fangi á okkum, tvørturímóti skal eitt stórt og grundigt arbeiði gerast, skal nakað slíkt kunna henda.

- Men tað er eingin ivi um, at tað hevur týdning at eksponera Føroyar. »Barbara« er ein filmur, sum fólk hava lagt merki til, og einki er at ivast í, at »Buzz Aldrin« fer at hava somu ávirkan, sigur Martin Simonsen, verkleiðari av FISK09.




*Martin Simonsen er verkleiðari fyri FISK09 og leiðari á filmsverkstaðnum Klippfisk*
*Mynd: Beinta Haraldsen*



*Ungfólkini úr norðurlondum og baltisku londunum hava arbeitt við filmsgerð í tvær vikur, og klippa nú úrslitið liðugt*
*Mynd: Beinta Haraldsen*

# Bilur út av vegnum á Hjalla

**Um 16.30-tíðina í gjár fór ein vøruvognur út av vegnum uppi á Sandvíkarhjalla tá hann yvirhálaði ein persónbil**

FERÐSLUÓHAPP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyri aðru ferði innan fáar dagar hendi eitt ferðsluóhapp uppi á Hjalla í Havn.

Av politistøðini verður sagt, at óhappið hendi, tá ein persónbilur og ein vøruvognur koyra niðan eftir á Sandvíkarhjalla. Komnir niðan um Vøruhúsið á Hjalla heldur førarin av vøruvogninum, at bilurin framman fyri koyrir nakað seint og ger tí av at yvirhála.

Komin næstan fram um persónbilin snarar hesin, sambært løgregluni, knappliga til vinstru og rakar inn í bakskermin á vøruvognunum.

Hetta førir til, at førarin av vøruvogninum missir tamarhaldið og rennir gjøgnum eitt hegn út av vegnum til høgru. Hann endar á liðuni í túninum hjá Kemilux á Sandvíkarhjalla, beint uttan fyri kaffistovuna hjá fyritøkuni.

Eingin mannskaði hendi, og sambært løgregluni stóðst óhappið ikki orsakað av ov nógvari ferð.



*Vøruvognurin endaði beint framman fyri kaffistovuni hjá Kemilux á Sandvíkarhjalla*
*Mynd: Allan Simonsen*